**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Merking av toski og øðrum fiskasløgum á Landgrunninum. Túrur nr. 1440**
**Tíðarskeið 15 - 22/10 - 2014**

---

**Fólk frá HAV:** Petur Steingrund, Marit Pedersen, Poul Vestergaard, Regin Kristiansen, og Jens Arni Thomassen.

**Ábyrgd:** Petur Steingrund, kanningarleiðari.

**Endamál:** Endmálið er at kanna ferðingarmynstrið hjá toski og hýsu á føroyska landgrunninum.

**Eyka uppgávur:** Ein hitamátari varð settur út á hydrografi-standardskurði N, á 450 metra dýpi, sum er norður úr Fugloynni. Umhvørvisstovan fekk 25 smáfiskar til kanningar av eiturevnum. Heilsufrøðiliga Starvsstovan fekk nakað av sandsprøku til kanningar av fiskasjúkum.

**Reiðskapur:** Stjørnutrol við 100 mm meskum í brókaposanum. Vágslemmar. Breitlalongin er 60 m. Rockhopper grunnur. Til merkingina: merkipistól og merkir, mátibretti, vekt, kassar og slangur, klokka, skriviútgerð og teldur.

**Um túrin:** Fóru av Havnini mikukvøldið 15/9-2014 kl. 22. Veðrið var gott, so vit byrjaðu at merkja vestan fyri Skúvoy. Har lógu vit til á miðdegi fríggjadagin og høvdu tá merkt 1157 toskar. Fóru á Mýlingsgrunnin og lógu í eitt døgn og merktu 237 toskar. Sigldu til økið norður úr Fugloynni (450 metra dýpi), har vit settu ein temperaturmátara út. Løgdu okkum síðan at merkja eystanfyri restina av tíðini og fingu merkt 606 toskar har. Eisini merktu vit nakað av hýsu og onkra havtasku og seið. Tá varð vindur av útsynningi og vit máttu liggja stilt í nakrar tímar mánadagin. Vit vóru á Havnini týsdagin kl. 13. Merkingarlistin er vístur í talvuni niðanfyri.

**Fyribilsúrslit:** Vit fingu merkt nærum dupult so nógv av toski sum í fjør og komst tað mest av, at vit fingu roynt í økinum vestan fyri Skúvoy. Vit merktu eisini nakað av hýsu og onkra einstaka havtasku og onkran seið. Vit fingu 39 merktar toskar aftur; av teimum høvdu 18 verið í sjónum í eitt ár ella longri.

| Øki | Havtaska | Upsi | Hýsa | Toskur | Miðallongd |
|---|---|---|---|---|---|
| Á Mýlingsgrunni | 0 | 0 | 0 | 237 | 58.2 |
| Nordur úr Kunoyarnakki | 0 | 0 | 0 | 2 | 78.5 |
| Vestan fyri Skúvoy | 2 | 0 | 0 | 1157 | 63.0 |
| Eystanfyri | 1 | 4 | 128 | 606 | 65.2 |
| Íalt | 3 | 4 | 128 | 2002 | 63.1 |

**Nær eru merkilistarnir lisnir inn á teldu:**
Merkilistin var liðugur 24. oktober.

Á Havstovuni 24. oktober 2014
Petur Steingrund – kanningarleiðari.